Eldraráðið í Tórshavnar kommunu
Tórsgøta 21, 100 Tórshavn
eldrarad@torshavn.fo

TÓRSHAVNAR KOMMUNA

# Eldraráðið 2021 – 2024

| | |
|---|---|
| Fundur: | Nr. 10 |
| Tíð: | 19-08-2021 |
| Stað: | Tilhaldið í Tórsgøtu |

**Møtt:** Katrin Holm, forkvinna, Bjørghild Djurhuus, næstforkvinna, Julianna Klett, kassameistari, og Petur Rouch, skrivari.

Tað lá ikki fyri hjá Marini Rasmussen at møta. Ei heldur hjá fyrstvalda varalimi.

**Fundarskrá:**

1. Fyrireika kvøldfundin hjá Eldraráðnum tann 26. August
2. Umrøða felagsfund við Eldraráð kring landið í Tórshavn, sum umrøtt á Vági.
3. Ymiskt.

## AD 1 Fyrireika kvøldfundin hjá Eldraráðnum tann 26. August

Ætlanin var, at fyrsta tiltakið hjá Eldraráðnum skuldi vera komandi hósdag, 26. august, og at fyrsta kvøldið skuldi vera við Marius Rein, sum skuldi hugleiða um gomlu Havnina. Tíanverri er Marius uttanlanda, og ikki bar til hjá honum at fyrireika seg til eitt slíkt kvøld við so stuttum skotbrái. Vit avtalaðu, at hann letur frætta frá sær, tá hann kemur aftur til landið. So enn vita vit ikki, nær fyrsta tiltakið verður.

## AD 2 Umrøða felagsfund við Eldraráð kring landið í Tórshavn, sum umrøtt á Vági.

Eldraráðið hevur fingið áheitan frá øðrum eldraráðum í landinum um at halda felags fund, har felags mál vóru umrødd. Undirritaði greiddi frá, at hann hevði luttikið á ársfundinum hjá Landsfelag Pensjónista á Kambsdali leygardagin 14. august. Har helt Beata Samuelsen røðu, har hon eftirlýsti tættari samband millum Landsfelag Pensjónista og lokalu eldraráðini. Vit samdust um, at heldur enn, at vit í Havn savna hini eldraráðini, hevði tað kanska verið hóskiligari, at Landsfelag Pensjónista tók stig til ein slíkan árligan fund. Tí var avgjørt at seta seg í samband við Landsfelag Pensjónista, har Beata Samuelsen er forkvinna, at fáa samskifti í lag um hetta mál.

<u>AD 3 Ymiskt</u>

Bjørghild Djurhuus hevur biðið um farloyvi frá Eldraráðnum fram til endan av oktober 2021. Hetta var henni játtað. Í staðin verður Ingigerð á Trøðni at møta fyri hana í tíðarskeðnum, farloyvið varar.

Vit umrøddu eisini, at vit eiga at heita á Tórshavnar kommunu um at lata Tilhaldið verða opið út á kvøldið til trivnaða fyri eldru borgarar í kommunni.

Fundur lokin klokkan 14:45.

Næsti fundur er settur at vera hósdagin 2. september 2021.

Skrivað 24. august 2021

Tórshavn DATO

Petur Rouch,
skrivari